# Hvussu stórt virði hava tíni klæði?

Kennir tú tað aftur: Skápið er smekkfult, men allíkavæl hevur tú einki at fara í. Og tí noyðist tú simpulten aftur út at keypa tær okkurt smart til føðingardagin/veitsluna/jólafrokostin. Og tú keypir kanska eitt sindur dýrari enn tú hevði ætlað, tí "hetta er í grundini ein íløga, sum tú fert at kunna nýta í minst 20 ár". Men longu næstu vikuna hevur tú aftur einki at fara í.

## Tryggjað klæðini?

Men hevur tú nakrantíð hugsað um, hvussu nógvan pening tíni klæði eru verd? Hvussu nógvir 1000 krónuseðlar liggja, tá alt kemur til alt, í tínum klædnaskápið? Um tú roknar gerandisklæðini, ítróttarklæðini, penu klæðini, stásið og føroysku klæðini, umframt allar skógvar, jakkar, frakkar og troyggjur við, so er talan um nógvan pening tilsamans, ikki so? Heilt nógvan pening! Harafturat kemur so alt hitt innbúgvið.

Hetta hava tey í Tryggingarfelagnum Føroyar hugsað um, og vit hava í tí sambandi tosað við Helga L. Petersen, sum starvast har.

– Okkara royndir eru, at fólk sum heild tryggja innbúgvið alt ov lágt. Fólk hugsa ofta ikki um alt, sum tey eiga. T.d. smykkur, sminka, flott ur og øll tekniska útgerðin sum telefonir, stereoannlegg, i-pod og slíkt, verða ofta als ikki roknað við, greiðir Helgi L. Petersen frá.

Hann sigur, at tað er kundin sjálvur, ið ásetir virðið á innbúgvinum, men tað ber til at fáa hjálp frá tryggingarfelagnum.

– Vit hava gjørt ein vegleiðandi faldara, sum skal hjálpa fólki at hugsa um ting, ið tey annars ofta hava lyndi at gloyma. Har er ein listi, ið skal hjálpa fólki at koma til eitt reelt tal, sum dekkar alt innbúgvið, greiðir Helgi L. Petersen frá.

## Flestu áseta ov lágt

– Okkara royndir eru, at fólk áseta virðið alt ov lágt, og tað kann fáa óhepnar avleiðingar. Tí um okkurt skuldi hent, hevur kundin ikki rætt til meiri, enn hann hevur tryggjað fyri, sigur Helgi L. Petersen at enda.

So eitt gott hugskot er avgjørt, at fara heim og telja upp, og minst til klædnaskápið!

Lagt til rættis: Eydna Skaale
eydna@sosialurin.fo



*Hevur tú nakrantíð hugsað um, hvussu nógv tú í grundini hevur investerað í klædnaskápið? Fert tú at telja upp, verður samlaða talið helst størri enn væntað*

